# Borgarstjórin hevði ikki undirtøku

**Heðin Mortensen, borgarstjóri, lurtaði ikki eftir býráðslimunum, tá hann syrgdi fyri, at parkeringsbásarnir á Kongabrúnni hvurvu í summar**



*Parkeringsbásarnir á Kongabrúnni*
Savnsmynd




Almennur fyrilestur

Almennur fyrilestur í Norðurlandahúsinum leygardagin 11. september kl. 16.00

Í sambandi við altjóða alzheimerdagin verður fyrilestur í Norðurlandahúsinum við Gunhild Waldemar, professara undir heitinum "Tað seinasta um fyribyrging og viðgerð fyri demens sjúkur"

Gunhild er professari, dr. med og leiðari á Minnisdeplinum (Hukommelsesklinikken) á Ríkissjúkrahúsinum. Hon fer at greiða frá tí, ið vit vita um minnissvinn (demens) í dag, um nýggjastu granskingina, og um hvussu vit kunnu greina sjúkuna tíðliga, og hvørjir fyribyrgingar- og viðgerðarmøguleikar eru.

Øll eru vælkomin

Alzheimerfelagið
www.alzheimer.fo


Uni Holm Johannesen

Sjey parkeringsbásar á Kongabrúnni hava eftir øllum at døma elvt til drúgt kjak í Tórshavnar býráð.

Marin Katrina Frýdal, býráðslimur, var sannførd, tá hon prátaði við Sosialin í farnu viku.

– Heðin Mortensen, borgarstjóri, hevur ikki lurtað eftir býráðslimunum, og tað eru fleiri av okkum týðiliga argir um. Uppgávan hjá borgarstjóranum er fyrst og fremst at standa fyri samtyktum, men hann hevur ignorerað okkum í hesum málinum, segði Marin Katrina Frýdal.

Heðin Mortensen svaraði aftur.

– Um Marin Katrina Frýdal hevur viðmerkingar, so er hon vælkomin at siga tað við meg, áðrenn hon fer til fjølmiðlarnar. Eg havi einki hoyrt frá henni í hesum sambandinum, segði borgarstjórin.

## Ikki undirtøku

Málið snýr seg um, at Sp/f B&B søkti í fjør um loyvi at innrætta veghæddina í Hotel Djurhuus til matstovu, og Áarstovugrundina til útiservering.

Umsøkjarin metti, at hansara ætlanir fingu positivt árin á økið, samstundis sum økið varð eitt prýði fyri Tórshavnar kommunu.

– Fyri einum ári síðan var farið í holt við fyrireikingarnar at fríðka um Hotel Djurhuus og Fútastovu. Ætlanin var at binda ognirnar saman soleiðis, at tú fekk eina heild á kongabrúnni við matstovu, torgi og søguni, hevur Petur Jacobsen, eigari, greitt frá í summar.

Málið varð viðgjørt í býráðnum, og eitt av krøvunum, sum býráðið setti, var, at hámarksferðin millum Áarstovu og Café Natúr verður 30 km/t.

Fíggjarnevndin boðaði hin 10. mars í ár frá, at »neyðugt er at minka um Fútatorg, so pláss verður fyri, at bilarnir frá parkeringsplássinum kunnu bakka út. Tað merkir, at sjey metrar skulu verða millum parkeringsbásarnar og Fútatorg«.

Byggi- og býarskipanarnevndin og ferðslunevndin mæltu frá at taka parkeringsbásarnar burtur.

## Parkeringsbásarnir burtur

Stutt áðrenn drotningarvitjanina í summar hvurvu parkeringsbásarnir.

– Tað var í samband við drotningarvitjanina, ólavsøkuna og annað, sum var í summar, segði Heðin Mortensen.

– Borgarstjórin tók einsamallur avgerðina, og hevur ikki lurtað eftir býráðslimunum. Tað er als ikki nøktandi, sigur Marin Katrina Frýdal.

Sosialurin hevur fingið innlit í málið, og á fýra býráðsfundum – hin 30. november, hin 11. februar, hin 1. mars og hin 10. mars – var mælt frá at taka parkeringsbásarnar burtur.

Men Heðin Mortensen tók einsamallur avgerð um, at básarnir skuldu burtur.

– Eg veit einki um, at eg ikki hevði undirtøku, var stutta niðurstøðan hjá borgarstjóranum, tá Sosialurin prátaði við hann í farnu viku.

Men hví var umráðandi at parkeringsbásarnir hvurvu?

– Tí vit fríðkaðu um økið, og bilar kundu ikki verða parkeraðir har, meðan arbeiðið fór fram. Tað vóru boðini frá arbeiðsmonnunum, sigur Heðin Mortensen.

Men borgarstjórin lurtaði ikki eftir býráðslimunum, og tað kann Marin Katrina Frýdal als ikki taka undir við.




*Marin Katrina Frýdal, býráðslimur, til vinstru, og Heðin Mortensen, borgarstjóri, til høgru*

– Borgarstjórin hevur sum uppgávu at syrgja fyri, at nevndarsamtyktir verða førdar út í lívið, men her spælur hann solospæl, sigur Marin Katrina Frýdal.

Heðin Mortensen hevur boðað frá, at parkeringsbásarnir koma aftur, nú summarið so smátt er farið afturum.